UTTAN ÚR HEIMI

## Tað var hann

Amerikanskir serfrøðingar halda við vissu, at tað var Osama bin Laden, sum tosaði á ljóðbandinum, sum arabiska sjónvarpsstøðin Al-Jazeera sendi í síðstu viku.

Amerikanska fregnartænastan CIA og serfrøðingar hjá tjóðskaparliga trygdarráðnum hava kannað upptøkuna seinastu dagarnar, og í gjár segði ein talsmaður hjá myndugleikunum, at tað er lítil ivi um, at røddin á bandinum var bin Ladens. Ljóðgóðskan á upptøkuni er vánalig, men tað kemst sambært amerikanarum av, at upptøkan er gjørd ígjøgnum telefon.

Á bandinum tosaði bin Laden um bumbuspreingingina á Bali og gíslatøkuna í Moskva, og tað er tí greitt, at upptøkan er nýggj. Hetta er fyrstu ferð síðani í desember í fjør, at amerikanskir myndugleikarnir halda seg hava fingið vissu fyri, at yvirgangsleiðarin framvegis er á lívi.

## Ikki at spæla við

Ein 17 ára gamal svenskur drongur og tveir felagar hansara úr Týsklandi og Spania vórðu tiknir í USA í síðstu viku og skuldsettir fyri at hava eggjað til yvirgang á alnótini.

Teir tríggir dreingirnir, sum gingu í einum skúla í Salt Lake City, høvdu gjørt ein videofilm, sum vísti eitt flográn. Á filminum sást ein maður í turban skjóta eftir einum amerikanskum flaggi.

Vertsfólkini hjá svenska dronginum funnu filmin, og tey hildu innihaldið vera so ræðandi, at tey søgdu løgregluni frá. FBI kom uppí og avhoyrdi teir tríggjar dreingirnar, so tó sluppu undan revsing. teir trígir eru nú farnir úr USA.

## Neyðugt við 22 mia.

ST hevur biðið limalondini játta 22 milliardir krónur til neyðhjálp til 50 milliónir fólks, sum líða neyð ymsastaðni kring heimin.

Í rinari nýggjari frágreiðing sigur heimsfelagsskapurin, at felagsskapurin ætlar at leggja dent á at hjálpa fólki í londum, sum hava lagt krígg og ósemjur aftur um seg, og sum hava hjálp fyri neyðini til at koma fyri seg aftur. Nevnd verða lond sum Afghanistan og Sierra Leone.

Í fjør bað ST um 18 milliardir krónur til at hjálpa 33 milliónum fólkum við mati, og so tey kundu fáa okkurt at búgva í. Av talið er størri nú kemst fyrst og fremst av áhaldandi turki og nógvastaðni í Afrika, men neyðugt er eisini við nógvum pengum til flóttafólkini, sum eru vend heimaftur til Afghanistan.

## James Coburn deyður

Ein av teimum gomlu Hollywood-stjørnunum, James Coburn, doyði mánadagin í heimi sínum í Beverly Hills 74 ára gamal.

James Coburn gjørdist kendur í 1960 fyri leiklutin, sum hann hevði í filminum "The Magnificent Seven", og tey næstu 40 árini soeldi hann í fleiri filmum. Serliga kendir eru leiklutir hansara í westernfilmum so sum "Pat Garrets and Billy The Kid" og "Young Guns II". Amerikanskar bióhallir vísa í hesum døgum filmin "The Man From Elysian Fields", har James Coburn spælir saman við Andy Garcia og Misk Jagger.

James Coburn doyði av einum hjartatilburði, meðan hann og konan sótu í stovuni og lurtaðu eftir tónleiki.

# "Prestige" fór av um tvøran

**Tangaskipið "Prestige", sum seinastu vikuna hevur rikið úti fyri sponsku útnyrðingsstrondini, fór í gjár av um tvøran. Nú er vandi fyri einari rættiligari umhvørvisvanlukku.**



UMHVØRVISDÁLKING
*Árni Joensen:*

"Prestige" kom í havsneyð úti fyri sponsku útnyrðingsstrondini seinasta mikudag. Sponsku myndugleikarnir stúrdu fyri, at hol kundi koma á skipið, ella at tað kanska kundi fara av um tvøran, og tí vórðu sleipibátar sendir at toga skipið longur út frá landi. Mánakvøldið boðaðu spaniumenn so frá, at skipið var farið inn í portugisiskan sjógv, og portugisiska stjórnin svaraði alt fyri eitt, at har slapp skipið ikki í havn. Til tess var vandin fyri einari umhvørvisvanlukku alt ov stórur.

Men gjáramorgunin brotnaði "Prestige" av um tvøran, og nú er umhvørvisvanlukkan ein veruleiki.

Upprunaliga vóru umleið 70.000 tons av olju í tangunum á "Prestige", men hildið verður, at umleið 4.000 tons vóru likin úr tangunum, áðrenn skipið fór tvørturav. Nógv olja er rikin inn á sponsku strondina, har fiskimenn noyðast at sita við hús, og fiskavirkini hava latið aftur.

Spanskir og portugisiskir myndugleikar bera nú ótyta fyri einari umhvørvisvanlukku, sum kann gerast líka álvarssom, sum tá "Exxon Valdez" fór á land í Alaska í 1989. Sponsku myndugleikarnir væntaðu í gjár, at tangaskipið fór at søkka, men sjálvt um tann nógva oljan endar á botni, kann hon gera óbótaligan skaða á einari leið, sum er millum tær bestu fiskileiðirnar hjá spaniumonnum.

Í gjár lá ein 1200 ferkilometra stórar oljuflaki einar 80 fjórðingar úr sponsku útnyrðingsstrondini. Myndugleikarnir siga, at rekur hendan oljan inn at strondini, verður tað sera torført at fáa hana upp, tí har eru nógvar smalar víkir, sum verða truplar at rudda aftur.

Skiparin á "Prestige" situr í varðhaldi í spanska býnum La Coruna, har hann er skuldsettur fyri at hava sýtt fyri at gera eftir boðum frá sponsku myndugleikunum og fyri umhvørvisdálking. Spanskir fiskimenn hava boðað frá, at teir fara at reisa endurgjaldskrav ímóti skiparanum.

"Prestige", sum er 26 ára gamalt, er skrásett í Liberia, men tað er eitt felag í Grikkalandi, sum reiðir skipið út.

# Sløkkiliðsmenn í øðini

**Sløkkiliðsmenninir í New York eru í øðini um eina nýggja bók, sum leggur teir undir at hava rænt ein handil undir ruðuleikanum tann 11. september í fjør.**

BÓKAÚTGÁVA
*Árni Joensen:*

Sløkkiliðsmenninir í New York, sum gjørdust sannar hetjur aftan á atsóknina at World Trade Center, eru í øðini um eina nýggja bók, sum lýsir arbeiði teirra undir og aftan á atsóknina.

Í bókini skrivar høvundurin William Langewiesche, at nakrir av sløkkiliðsmonnunum gjørdu sær dælt av ruðuleikanum aftan á atsóknina, og at teir rændu ein handil nærhendis World Trade Center. Sambært høvundinum varð ymiskt tjóvagóðs úr handlinum funnið í einum av sløkkiliðsbilunum seinni.

Sløkkiliðsmenninir siga, at bókin sigur als ikki sannleikan um arbeiði teirra, og at frásøgnin um stuldurin er ósonn. Tá høvundurin mánadagin helt fyrilestur á Manhattan, savnaðust umleið 200 sløkkiliðsmenn uttan fyri hølið, har teir mótmæltu bókini og róptu rakstrarróp eftir høvundinum.

Hvussu er og ikki. Bókin um sløkkiliðsmenninar er tann mest selda í USA í hesum døgum.

# Ávara um yvirgang

**Myndugleikarnir í Avstralia ávara um eina yvirgangsatsókn innan tveir mánaðir.**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen:*

Avstralska stjórnin segði seg í gjár hava fingið ábendingar um, at yvirgangsmenn ætla at skipa fyri einari atsókn í landinum teir báðar næstu mánaðarnar.

Chris Ellison, innanríkisráðharri legði dent á, at stjórnin veit ikki, hvat slag av yvirgangi talan kann verða um, men hann mælti fólki til at vera á varðhaldi uttan tó at leypa framav.

Sambært ráðharranum verða ábendingarnar, sum stjórnin hevur fingið, mettar at vera álítandi.

Hetta er ikki fyrsyu ferð, at avstralsku myndugleikarnir ávara um yvirgang.

